


STARVSLÝSING

# Búskaparfrøðingur

Søkt verður eftir einum búskaparfrøðingi at starvast á fíggjardeildini fulla tíð.

## Um fíggjardeildina

Fíggjardeildin hevur ábyrgd av at fyriskipa og samskipa fíggjarligu viðurskiftini á stovninum. Fíggjardeildin hevur eftirlitið við, at játtanirnar halda, ráðgevur leiðsluni og hinum deildunum á stovninum um innanhýsis fíggjarstýringina og ger ymisk hagtalsyvirlit til stovnin og aðrar almennar myndugleikar. Harafturat umsitur Landsverk íløgur og viðlíkahaldsuppgávur fyri onnur ráð.

Stovnurin hevur eisini ábyrgd av at gera samfelagsbúskaparligar útgreiningarnar í sambandi við íløgur og viðlíkahald og at menna fíggjarstýringina í sambandi við verkætlanir og rakstrarætlanir. Tí søkja vit eftir einum búskaparfrøðingi, sum skal vera við til at menna hetta arbeiðsøkið uppaftur meira.

Á deildini starvast fimm fólk, og tú kemur at vísa beinleiðis til fíggjarleiðaran.

## Arbeiðsøkið

Sum búskaparfrøðingur kemur tú at hava ábyrgdina av:

- at gera costbenefit-kanningar og -frágreiðingar
- at vera við til at menna fíggjarstýringina á stovninum
- at vera við til at menna fíggjarstýringina av stovnsins verkætlanum og rakstrarætlanum
- herundir at gera disponeringsroknskapir
- at vera við til at gera fíggjarlógararbeiðið fyri avvarðandi ráð
- at menna hagtalsgrundarlagið

Tú kemur eisini at luttaka í øðrum arbeiðsuppgávum hjá deildini, t.d. dagliga fíggjareftirlitinum, hagtalsarbeiðinum og ársroknskapargerðini.

## Førleikakrøv

Vit sóknast eftir einum fólki við viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. cand. polit, cand.merc. HD(R) ella líknandi.

Vit vilja røkka best møguligum úrslitum og vænta tí, at tú sýnir arbeiðssemi, dugnaskap og nærlagni. Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ein arbeiðsglaður viðleikari við góðum samstarvsevnum og málbert teg væl, bæði skrivliga og munnliga.

## Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

## Umsóknir

Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella til:
Landsverk
Postmoga 78
FO-110 Tórshavn
og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2008.
Merk umsóknina „Umsókn-Búskaparfrøðingur" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árant Andriasson, fíggjarleiðara, á 540 821 ella aa@lv.fo.

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land